# Ongar ítøkiligar ætlanir

**Karen Marie Olesen, fúti, sigur, at ongar ítøkiligar ætlanir eru um at seta upp vakmyndatól á útvaldum støðum, men møguleikin er við í umhugsingunum**

Leo Poulsen

Tað liggja ongar ætlanir og bíða hjá løgregluni at seta upp vakmyndatól, hvørki í Klubbagarðinum ella í Steinatúni.

– Vakmyndatól finnast jú á privatum dansi- og skeinkingarstøðum, men um vit skulu seta slík tól upp, verður tað í samstarvi við aðrar myndugleikar, eitt nú kommununa, sigur Karen Marie Olesen.

Bæði ákærar og løgregla harmast ofta um, at ongar myndir frá vakmyndatólum eru tøkar, serliga í harðskapsmálum, men sum sæst í aðrari grein her á síðuni finst heimild í lógini um persónsupplýsingar at seta slík tól upp.

Karen Marie Olesen sigur, at munur er á Klubbagarðinum, sum er privat øki og Steinatúni, sum er alment øki.

– Skal vakmyndatól setast upp í Steinatúni, so skulu vit gera tað í samstarvi við kommununa, sigur Karen Marie Olesen.

So hóast møguleikin er til staðar, bendir einki á, at løgreglan ætlar at seta vakmyndatól upp á ásettum støðum í nærmastu framtíð



*Karen Marie Olesen hevur ongar ætlanir um at seta vakmyndatól upp*



# Einki forðar nýtslu av vakmyndatóli

**Tað er mangan, at løgregla og ákæruvald – og í summum førum eisini verjar – kundu hugsað sær upptøkur frá einum vakmyndatóli serliga í sambandi við harðskapsmál. Nú upplýsir Annika Olsen, at sambært Dátueftirlitinum er einki, sum forðar fyri hesum**

Leo Poulsen

Tað er staðfest, at flestu harðskapsmál fara fram serliga í tveimum støðum í Havn, í Klubbagarðinum – sum er klárt nummar eitt – og í Steinatúni.

Tað hevur mangan verið ført fram, hvussu nógv lættari og skjótari alt kundi veirð avgreitt, um vakmyndatól høvdu verið uppsett á hesum støðum, men vanliga fatanin hevur veirð, at lógarverkið ikki loyvdi hesum.

Nú vísir tað seg, at hetta er ikki so.

- Vakmyndatól á slíkum støðum eru ikki í andsøgn við Persónsupplýsingarlógina, tí tey verða roknað sum alment gagnlig endamál, sigur Annika Olsen.

Eftir áheitan hevur landsstýriskvinnan kanna eftir, um slík vakmyndatól eru lóglig, og um ikki, hvat kann gerast fyri at verða lóglig. Men kanningin hevur víst, at tað ber til at seta vakmyndatól upp.

- Tá talan er um gagnlig endamál kunnu vakmyndatól setast upp við teirri treyt, at eftirlit verður havt við, hvør sleppur fram at at skoða hesi tól. Um talan er um, at tað er løgreglan, ið umsitur eftirlitið við vakmyndatólunum, eru treytirnar loknar. Og eitt vakmyndatól í til dømis Klubbagarðinum hevði Dátueftirlitið ikki frámælt, sigur Annika Olsen.

## Stór hjálp

Vakmyndatól verða í stóran mun nýtt í londunum rundan um okkum og í Europa í síni heild. Tað er so javnan at síggja í eitt nú donskum miðlum, at fólk verða eftirlýst saman við mynd ella upptøku frá vakmyndatóli.

Somuleiðis verður slíkar upptøkur eisini javnan nýttar í rættarmálum í Danmark, Onglandi og flestu øðrum europeiskum londum eisini.

Tað er einki at ivast í, at vakmyndatól í Klubbagarðinum, Steinatúni og møguliga eisini Grasagarði høvdu gjørt stóran mun í teimum harðskapsmálum, sum so javnan henda á hesum plássum.

Eitt krav er sjálvandi, at upplýsingar eru á støðunum um, at vakmyndatól eru uppsett, men hetta kann bert hava fyribyrgjandi virknað.

Vakmyndatól eru sum sagt sett upp á flestu almennu støðum í Danmark, so sum tokstøðum, torgum, ja, sjálvt í tokunum hjá DSB.

Eftir ein skottilburð í kendu Jomfru Ane gade í Aalborg vórðu eisini vakmyndatól sett upp í teirri gøtuni.

Undir øllum umstøðum slær Annika Olsen fast, at tað er einki í verandi Persónsupplýsingarlóg, sum forðar fyri, at vakmyndatól verða sett upp til gagnligt endamál, so leingi sum til dømis løgreglan hevur tólini um hendi.